UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Sumbiar Kommuna
í Kerinum 27
970 Sumba
Føroyar

Tórshavn, tann 4. mai 2022
J.nr.: 22/03458-9
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

***Góðkenningarskriv***

**Broyting í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu fyri Víkarbyrgi**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Sumbiar kommuna í telduposti dagfestum 12. februar 2022 sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu til góðkenningar.

Broytingin snýr seg um, at ein partur av matr. nr. 70 í Víkarbyrgi verður broyttur frá H-landbúnaðarøki til I-summarhúsøki.

Broytingin hevur ligið frammi frá 11. januar til 22. februar 2022. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í áliti dagfestum 5. apríl 2022 til at góðkenna broytingina í byggisamtyktini fyri Víkarbyrgi. Nevndin hevur í álitinum viðmerkt, at tað eigur at verða gjørdur ein heildarplanur fyri Víkarbyrgi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir, at ein partur av matr. nr. 70 í Víkarbyrgi verður broyttur frá H-landbúnaðarøki til I-summarhúsøki.

Heitt verður somuleiðis á kommununa um at fáa gjørt ein heildarplan fyri Víkarbyrgi, soleiðis sum Býarskipanarnevndin mælir til.

Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu fyri Víkarbyrgi eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum eitt nú friðingarmyndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt rættað kortskjal við átekning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

K H Poulsen

Kristvør H. Poulsen